# Samgongan raðfestir familjupolitisk átøk – eisini til fyrimuns fyri stakar uppihaldarar

HANS PAULI STRØM
landsstýrismaður



Ongin ivi man vera um, at stakir uppihaldarar hava trupul kor, tí so sum samfelagsviðurskiftini eru ídag, røkkur illa bert við einari inntøku, til at tryggja familjuni sámilig kor. Sjálvandi er munur á støkum uppihaldarum eins og øðrum – summi eru betri fyri enn onnur. Men samanumtikið hava stakir uppihaldarar størri trupulleikar enn onnur við at fáa endarnar at røkka saman. Livikostnaðurin í Føroyum í dag – til bústað og fastar útreiðslur og alt annað sum hoyrir gerandislívinum til – er rætt og slætt ov høgur til at ein inntøka kann bera eitt húsarhald hjá eini barnafamilju.

Tí eru landsstýrið og samgongan í ferð við at seta eina røð av serstøkum familjupolitiskum átøkum í verk. Hetta settu vit okkum fyri í fjør vár, tá vit fóru undir fíggjarlógararbeiðið fyri 2007. Hesum boðaði eisini løgmaður frá í røðu síni á Ólavsøku.

Tí eru fleiri átøk sett í verk seinastu tíðina og fleiri eru ávegis, sum av álvara fara at gera mun. Tað skal eg royna at greiða frá út frá teirri framløgu eg hevði á ráðstevnuni hjá føroyskum sosialráðgevarum á Altjóða Sosialráðgevaradegnum tann 28. mars.

**Vitanarforðingin er ein stórur trupulleiki**
Tann fyrsti stóri trupulleikin vit rena okkum í í Føroyum, er at vit hava ikki møguleikar fyri at áseta og avmarka, hvør er stakur uppihaldari. Vit kunnu skilja millum gift og ógift, onki annað. Men ógift nýtast ikki at vera støk – nógv eru tað heldur ikki, og fáa børn og liva saman í nógv ár, møguliga alt lívið, uttan at vera gift. Og tað eru gift, ið eru farin frá hvørjum øðrum og liva sum støk, annar parturin við børnunum.

Somuleiðis hava vit ongar møguleikar fyri at fáa upplýsingar fram um húsarhald og húsarhaldsinntøku. Vit kunnu bert fáa upplýsingar um inntøkur hjá giftum og ógiftum.

Alt hetta kemur av, at ongin samanbinding er millum persónsupplýsingar í fólkayvirlitinum, bústaðarupplýsingar í nýggju adressuskránni, og inntøkuupplýsingar hjá skattavaldinum.

Av somu orsøk ber snøgt sagt ikki til fyrisitingarliga t.d. hjá skattavaldinum at veita støkum uppihaldarum eina eyka hægri barnafrádrátt. Tá t.d. Tjóðveldisflokkurin kortini kemur júst við slíkum uppskoti, enntá fleiri ferðir uppí saman, so er tað politisk paraduuppskot, sum ikki kunnu setast í verk, tí vit hava ikki fyrisitingarligu møguleikarnar til tess. Landsstýrið og samgongan hinvegin viðurkenna henda trupulleikan, og hava tí gjørt av at gera tað neyðuga arbeiðið, sum skal til, fyri at loysa henda fyrisitingarliga trupulleikan. Meir um tað seinni.

**Neyðugt at meta um stakar uppihaldarar**
Tá tað enn ikki ber til at fáa tað at vita, mugu vit meta um stakar uppihaldarar út frá ymiskum viðurskiftum. Út frá einsháttaðum upplýsingum í hinum Norðanlondunum og barnatalinum í Føroyum, kunnu vera eini 1100 stakir uppihaldarar í Føroyum. Hyggja vit eftir, hvør fær "Barnagjald til einsamallar uppihaldarar", so eru tey eini 800 í tali. Og hyggja vit eftir, hvør fær fíggjarligt fríplass á dagstovnunum, eru tað eini 7-800. Her skulu vit minnast til, at bert húsarhaldsinntøkur undir 210 t. fáa fult fríplass – síðan verður tað avtrappað og er burtur longu tá húsarhaldsinntøkan er komin uppá 254 t.

So kanska fevnir hesin bólkurin um eini 1000 stakar uppihaldarar – og teirra børn - sum hava brúk fyri serligum familjupolitiskum átøkum.

**Neyðugt við fjølbroyttum tiltøkum**
Tað er onki einstakt tiltak, sum einsamalt kann rætta støðuna upp hjá støkum uppihaldarum. Tað er neyðugt við eini røð at tiltøkum, sum bæði rætta seg til møguleikarnar at fáa sær útbúgving, at kunna hava fast fótafesti á arbeiðsmarknaðinum, at kunna sameina arbeiði og familjulív, at kunna hava ein bústað, sum tað ber til at gjalda av einari inntøku, at hava greið foreldramyndugleikaviðurskifti o.s.v.

Tí fevna átøkini víða. Nøkur vera nú sett í verk, og fleiri eru ávegis.

**Tiltøk sum nú vera sett í verk**
Barsilsskipan fyri lesandi. Hetta skapar ungum, ið sum oftast eru støk, møguleika at kunna halda fast við sína útbúgving, um tey fáa børn, við at kunna fara í barnsburðarfarloyvi við fullum lestrarstuðli. Er samtykt við gildi frá í heyst.

Hækkaður lestrarstuðul fyri lesandi forsyrgjarar. Hesi munnu eisini í nógvum førum vera støk. Hetta verður gjørt við at barnaískoytisgjald verður lagt omaná lestrarstuðulin, í fyrsta lagi við 500 kr. mán. Er samtykt við gildi frá í heyst.

Rættarstøðan hjá støkum foreldrum er styrkt við lógarásetingini um felags foreldrarætt, sum fær gildi nú 1. apríl.

Verkætlan um at samanbinda persónsupplýsingar í fólkayvirlitinum við nýggju adressuskránna og skráir hjá skattavaldinum um inntøkuviðurskifti o.t. Við hesum fer at bera til fyri fyrstu ferð í Føroyum at fáa upplýsingar um familju- og húsarhaldsviðurskifti, harí um støk og húsarhaldsinntøkur. Umsókn um játtan til verkætlanina er komin í Løgtingið.

Umlegging av barnafrádráttinum í skattinum til beinleiðis útgjald, soleiðis at hesin stuðulin verður skilligur og eyðmerktur til barnið. Málið er í løgtingsins fíggjarnevnd.

**Tiltøk sum eru ávegis**
Forsyrgjarar í truplum korum, so sum stakir uppihaldarar, skulu fáa ein hækkaðan barnastuðul. Av tí at hetta ikki kann gerast fyrisitingarliga, má tað byrja sum ein veiting eftir umsókn. Samgongan hevur avgjørt at játta 8 mió. árliga til hetta. Lógaruppskot verður lagt fyri Løgtingið í heyst.

Ráðgevandi toymið fyri ungar kvinnur, sum hava serligan tørv á ráðgeving, t.d. í samband við fosturtøku, ella barnakonur, stakir uppihaldarar ella aðrar. Pengingur er settur av á fíggjarlógini til at fara ígongd í heyst.

Nýggj løggáva um lutaíbúðir kemur fyri Løgtingið eftir Ólavsøku, til tess at fremja lægri bústaðarkostnaðir og betri møguleikar fyri hóskandi bústøðum til ymiskan tørv.

Nýggj leigulóg er ávegis at leggja fyri Løgtingið eftir Ólavsøku, til tess at skapa størri trygd og størri dygd á leigumarknaðinum.

Lógaruppskot verður lagt fyri Løgtingið um at lække skattin av leiguinntøku munandi, so útboðið av leiguíbúðum kann økjast og minkast kann um trýstið á leigukostnaðin.

Allir løntakarar – eisini tímalønt - skulu hava rætt til endurgjald fyri at kunna vera heima barnsins fyrsta sjúkradag. Í fyrstu syftu verður miðað eftir, at partarnir á arbeiðsmarknaðinum fáa hetta í lag við sáttmálasamráðingarnar í vár.

**Tiltøk at fremja hjá kommununum**
Systkinarabatt í barnaansingarstovnum er enn bert í nøkrum fáum kommunum. Hetta eigur at verða sett í verk í øllum kommunum kring landið.

Fíggjarligt fríplláss eigur at verða broytt soleiðis, at inntøkumarkið fyri at fáa fríplláss verður flutt munandi upp. Í dag svarar tað ikki eingong til eina hálva miðal húsarhaldsinntøku.

**Tiltøk úr Visjón 2015 fyri vælferð**
Vit eiga at fáa eina skipan við bústaðartrygging, áleið tí stuðuli, sum í øllum hinum Norðanlondunum verður veittur sum eitt ískoyti til høgar bústaðarútreiðslur, samanborið við inntøkugrundarlagið. Hetta eigur at farast undir, tá upplýsingargrundarlagið um húsarhaldsviðurskifti er fingið til vega, og tá leigumarknaðurin er fingin at virka við nýggjari leigulóg.

Á almenna eins og privata arbeiðsmarknaðinum eiga at verða betri farloyvisskipanir, fyrst at barnsburðarskipanin verður longd upp í eitt ár, og síðan at nýggjar smidligar farloyvisskipanir fyri foreldur, at kunna betur sameina arbeiði og familju, serliag meðan børnini eru smá.

## Morgun við Tinghúsvøllin

*Pauli Nielsen*

Vit føroyingar duga so mangt, bæði gott og ilt. Eitt, sum vit duga næstan alt ov væl, er at vevja alt upp í ein ellubita. Fari tí at royna at vera týðiligur og greiður. Tað skal einki dirvi til hjá fleiri vaksnum monnum at skammfara ein ungan drong. Ørviti og onkur skilaleys øði eru nóg mikið. Øll merkja timburmenninar.

Tað skal stórt dirvi til at koma aftur um aftur hjá teimum, sum hava gjørt seg inn á onkran annan. Men tað hevði sømt seg. Og tað er tað einasta, sum gevur virðingina aftur.

Hondbóltsfinalan:
## Karmar ein ikki kann bjóða spælarum og áskoðarum

PALLI JOENSEN
Venjari

Nógv og drúgv umtala hevur verið eftir dystin millum bestu manslíðini hjá VÍF og Kyndli.

Eg eri ein av teimum, sum fór ógvuliga vónbrotin avstað aftur úr høllini á Hálsi henda sunnudagin.

Stórar vónir vóru settar til ta endaligu uppgerðina í ár millum stórfeløgini í føroyskum hondbólti.

Kappingini er skipað við einum grundspæli og einum endaspæli, so hóast eitt lið - VÍF í hesum føri hevur vunnið bæði grundspæl og endaspæl, so stendur alt, tá finalan skal spælast, púra opið.

Tá HSF við sínum limafeløgum hevur valt eina slíka loysn, m. a. fyri at hækka undirhaldsvirðið í hesi ítrótt, so tekur ein sjálvandi sum givið, at teir karmar, sum eru rundan um tílíka finalu, veruliga eru á einum støði, sum ein kann bjóða spælarum og áskoðarum. Tí eru fyrireikingarnar upp undir ein slíka av alstórum týdningi.

Her haldi eg, at HSF - dómaranevndin, hevur valt eina sera, sera óhepna loysn. Ein loysn, har vit ikki finna nógv fordømi. Eg skilji teg ikki Hartvig?? Tú/tit eiga at forútsíggja og harvið royna at umganga óneyðugar frustratiónir. Tín/tykkara uppgáva er í alvorliga stóran mun at vera tann liðurin, sum skal skapa best hugsandi tryggleika á vøllinum, og her mást tú/tit í dómaranevndini ikki undirmeta tann sálarliga partin bæði upp undir og undir einum tílíkum dysti.

Tá fýra fyrrverandi kyndilsleikarar skulu til at døma sítt egna "fyrrverandi" lið, er lættari at skapa óneyðuga øsing. Hannis var jú ein av spælarunum á kyndlaliðnum í fjør og ikki er óhugsandi, at ein lættari góðtekur eins egna"livihátt", alt annað vildi verið løgið!!!

Feløg og spælarar hava í longri tíð góðtikið dómaraparið Andreas og Eyðum, sum er okkara besta dómarapar, men so harvið at hugsa, at so er í fínasta lagi bara at seta eitt dómarapar av "fyrrverandi" kyndilsleikarum afturat **var tollut!**

At eitt dómarapar hevur ambitiónir og vil døma tær mest áhugaverdu uppgávurnar er ikki løgið, men har eru sikkurt onnur dómarapør, sum hava somu hugsan ella ynski.

Ikki ætli eg mær at gera so nógv út av sjálvum dystinum, men vil heilt avgjørt vísa á mína meining og ónøgd, at dømingin var vánalig, og at serliga tann eini dómarin var ikki førur fyri at tveita tann búnan av sær, sum hann átti at gjørt. At nógvir spælarar veruliga vóru tendraðir eri eg samdur í, men tíverri var kanska tann eini dómarin enn meiri tendraður, og harvið ikki førur fyri at skapa ró, men tað øvugta - rok!!!

Ikki trúgvi eg, at eitt føroyameistaraskap veruliga smakkar einum væl, um bara ivi verður sáddur um rætt er farið fram!!!

Vónandi koma vit at síggja betur avrik á vøllinum komandi vikuskifti.